# Pregio – rúmligur vørubilur frá Kia

## Peugeot 307 CC



Peugeot 307, ið nú fæst sum hatchback og stationvognur, kemur næsta ár sum 307 CC, (Coupé Cabriolet). Í sama stíli sum Peugeot 206 CC

*Kelda: Bil Magasinet*

## Toyota hybridbilar



Toyota er heimsins størsti framleiðari av hybridbilum, við heili 90 prosentum av marknaðinum. Av teimum 100 túsund Toyota hybridbilunum, ið eru seldir, eru 90 túsund Toyota Prius.

*Kelda: Bil Magasinet*

## Honda Accord



Ein nýggjur Honda Accord verður á bilaframsýningini í Paris í heyst. Talan verður um ein væl útgjørdan luksusbil, ið eftir ætlan skal kappast við teir smærru Lexus og BMW.

*Kelda: Bil Magasinet*

**Kappingin úr Korea harðnar alsamt, nú eisini á marknaðinum fyri vørubilar og smærri bilar við last. Tveir nýggir Kia eru komnir á marknaðin, Pregio og K2700**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Kia Pregio er ein rúmligur vørubilur til kappingarføran prís. Bilurin hevur stórt vørurúm uppá 6,12 rúmmetrar og lastar 1425 kg. Longdin á vørurúminum er 2,75 m, breiddin er 1,61 m. Pregio er væl egnaður til vøruflutning og sum arbeiðsbilur hjá handverkarum. Við einum vendiradius uppá 5,3 m er bilurin lættur at komu runt við í býnum í arbeiðsørindum. Førararúmið er gjørt til 3 persónar. Setrið í miðjuni kann gerast um til eitt borð.

Motorurin er 2,5 litur turbodiesel við 94 hk. Snúningsmomentið er 220 Nm við 2000 snúningar, sum er væl egnað til bilin.



*Kia Pregio er ein rúmligur vørubilur til kappingaføran prís. Her sýnir Jón Niclasen, goymslumaður hjá D.B. Bilum, bilin fram*

### Kia Pregio 2.5TCI

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.5 litur 4 syl. 94 hk turbodiesel v.intercoolara |
| Dekkstødd | 195-14 PR8 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 482.0 cm |
| Breidd | 181.0 cm |
| Hædd | 197.0 cm |
| Longd á vørurúminum | 277.5 cm |
| Breidd á vørurúmiinum | 161.5 cm |
| Hædd á vørurúminum | 136.5 cm |
| Eginvekt | 1600 kg |
| Lastievni | 1425 kg |
| Prísur | kr. 166.800,- |
| Søluumboð | P/F D.B.Bilar<br>J.Broncksgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 310600 |

# Kia K2700 – arbeiðsbilur við fleiri møguleikum



*K2700 fæst í trimum ymiskum útgávum. Her sum King cab. Maðurin í bilinum í Jákup Martin á Válinum frá D.B. Bilum*

**K2700 er ein arbeiðsvinarligur lastbilur frá Kia, ið verður gjørdur sum Single Cab, King Cab og Double Cab, har pláss er til 6 fólk í kabinuni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Við Kia K2700 eru fleiri møguleikar, hann fæst sum Single Cab, King Cab og Double Cab, ið hevur tvær rekkjur av setrum og pláss til 6 persónar. Størri húsið er, minni verður lastin. Alt velst um hvat bilurin skal brúkast til. Hann hevur dupult hjól aftan og ber vektina sera væl. K2700 er góður at koyra, bæði við og uttan vekt.

Motorurin er ein 2.5 litur turbodiesel við 94 hk. Snúningsmomentið er uppá 220 Nm við 2000 snúningar.

Bæði síðuspeglini eru monteraði beint undir forrútinum. Við tað at høgra síduspegl peikar nakað langt fram, ber til hjá bilføraranum at hyggja í speglið gjøgnum forrútin, ístaðin fyri síðurútin, sum er tað mest vanliga. Hetta hevur týdning fyra trygdina undir koyring. Bilurin fæst eisini við sentrallási, elsíðurútum, aircondition og differentialesperru.

### Kia K2700 II 2.5 TCI Single cab

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.5 litur 4 syl. 94 hk turbodiesel v.intercoolara |
| Toppferd | 126 km/t |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 503.0 cm |
| Breidd | 175.0 cm |
| Hædd | 199.5 cm |
| Longd á lastini (innan) | 313.0 cm |
| Breidd (innan) | 165.0 cm |
| Eginvekt | 1575 kg |
| Bilurin lastar | 1625 kg |
| Prísur | frá kr. 156.800,- |
| Søluumboð | P/F D. B. Bilar<br>J.Broncksgøta 15<br>FO-100 Tórshavn,<br>Tel. 310600 |



Single cab



King cab



Double cab

ítróttur

Nr. 110 • hósdagur • 13. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nógvir eru í nýggjum skóm



*B68 og NSÍ møtast í seinnu hálvfinaluni um løgmanssteypið í kvøld. Fyrri dysturin endaði við javnleiki 0-0, og tí er dysturin púra opin*

*MYND: Álvur Haraldsen*

**Bæði hjá B68 og NSÍ er mannfall, men tað nyttar einki at knarra um sovorðið, eru venjararnir samdir um**

B68-NSÍ
2. HÁLVFINALA
*Jóannes Hansen*

Í kvøld verður avgjørt á grasvøllinum á Svangaskarði, um tað skal vera B68 fyri aðruferð, ella tað skal vera NSÍ fyri fyrstu ferð, sum skal vera annar parturin í finaluni um løgmanssteypið. Eftir fyrru hálvfinaluna er alt púra opið. Úrslitið í Runavík var 0-0, og tá havt verður í huga, at landskappingardysturin á graslíkinum á Toftum síðsta mikukvøld endaði 1-1 kann ikki sigast, at annað liðið hevur betri kort á hondini.

Hjá NSÍ eru fleiri spælarar tøkir. Leikbannaðir eru Jónstein Petersen, sum hevur fingið trý gul kort í steypakappingini, og Sjúrður Jacobsen, sum varð útvístur í landskappingardystinum sunnudagin móti B36. Teir báðir plaga at manna vinstru síðuna hjá NSÍ. Djóni N. Joensen fór út beinanvegin sunnudagin. Hann er skaddur í lærkrikanum, og teir rokna við, at hann verður burturfrá í einar tríggjar vikur. NSÍ hevur breiðan hóp, og avloysararnir hava spælt á besta liðnum – Brynjolvur Nielsen, Ian Højgaard, Ken Nónklett, Eddie Mikkelsen og Mortan Hansen.

– Tað er sjálvandi ein smeitur, at báðir í vinstru síðu, sum hava verið væl upplagdir, eru burtur, men tað nyttar einki at knarra um tað, heldur Jógvan Martin Olsen, NSÍ venjarin. Hann og spælararnir vóru týskvøldið á grasinum á Svangaskarði og vandu. Nógvir vóru í nýggjum skóm, tí teir hava ikki spælt á grasi áður, og tað heldur NSÍ venjarin kann vera hansara monnum til ampa.

– Um vøllurin verður so turrur, sum hann var týskvøldið, so verður tað ikki so stórur trupulleiki. Tað verður verri, um tað verður vátt, heldur Jógvan Martin Olsen.

### Eiga at njóta tað

Frank Skytte, venjari hjá B68, hevur nógv at hugsa um í hesum døgum. Liðið hjá honum spælir tvær ferðir um vikuna, men hann knarrar ikki.

– Spælararnir hava vant síðan síðst í januar fyri at spæla dystir, og nú er møguleikin har. B68 verður umrøtt í bløðunum fýra ferðir um vikuna, so tað er ikki annað at gera enn at njóta tað, heldur Frank Skytte.

Anders Nygaard er framvegis skaddur, og Marcello Marcelino er framvegis sera ivasamur. Kanska verður hann á beinkinum. Tað nýggja hjá B68 er, at Hans Fróði Hansen hevur trupulleikar við lærinum. Hann hevur ikki vant í hesi vikuni, men á Toftum vóna teir, at hann verður tøkur í kvøld.

– Hans Fróði er sera væl fyri og ein rættiligur stríðsmaður. Men verður hann ikki førur fyri at spæla, so mugu vit fáa ein nýggjan mann í hansara stað, staðfestir B68 venjarin, sum roknar við, at talan verður um sera tættan og javnan dyst í kvøld.

– Tað verður dagsformurin, sum fer at gera av, um tað verður NSÍ ella B68, sum skal spæla í finaluni á ólavsøku.

## Finnur Hansson til Kyndil

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Kyndil brynjar seg til komandi kappingarár í hondbólti. Felagið hevur nú fingið enn ein leikara til felagið. Talan er um íslendingin Finnur Hansson, sum í fjør spældi við H71, ið fer at spæla í grønu troyggjuni komandi kappingarár.

Finnur Hansson var ein av bestu leikarunum í føroysku kappingini í fjør, og hann var millum toppskjúttarnar í landskappingini.

Umframt Finn hevur Kyndil fingið tveir aðrar leikarar aftur til felagið úr Neistanum. Íslendingurin Jacob Jónsson, sum í fjør spældi við Neistanum, skal nú aftur spæla við Kyndli. Hann hevur áður verið venjari hjá kyndilsmonnum.

Hans Áki Dahl-Christiansen spældi seinasta kappingarár við Neistanum, men hann skiftir nú yvir aftur til Kyndil.

Hesir tríggir leikararnir fara at styrkja ómetaliga nógv um liðið hjá Kyndli, ið ikki hevði nakað gott kappingarár í fjør.



*Finnur Hansson fer komandi kappingarár at spæla við Kyndli, eftir at hann hevur spælt við H71. Jacob Jónsson og Hans Áki Dahl-Christiansen skifta eisini felag úr Neistanum til Kyndil*

## Danmark í Parkini

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hóast HM-endaspælið fer fram í Suður Korea og Japan, so fer danska landsliðið tó at spæla á heimavølli.

Stórskermar verða settir upp í Parkini leygardagin, tá Danmark og England møtast í Niigata í Japan. Parkin letur upp ein tíma áðrenn dystarbyrjan, sum er klokkan 13.30 danska tíð. Dysturin verður vístur á einum stórskermi, sum er 40 fermetrar til støddar.

Flemming Østergaard, stjóri í Parkini, sigur, at ein slíkur dystur sjálvandi skal vísast á danska tjóðarleikvøllinum. Um veðrið ikki er til vildar, so verður takið drigið fyri, so at fólk kunnu sita turr og hyggja. Gitt verður, at fleiri enn 10.000 fólk fara at vera í Parkini leygardagin.